gult cyan magenta svart

Hendur og Hugflog á Hálsi

Í døgunum 21. til 23. juli verður søluframsýning í høllini á Hálsi, sum verður nevnd Hendur og Hugflog

STEFAN Í SKORINI

Tað eru fólk frá menningarstovuni og Føroya Heimavirkisfelag, sum skipa fyri tiltakinum, og endamálið við tí er at vekja ans fyri føroyskum handverki. Her verður serliga hugsað um gávulutir.

Framsýningin letur upp fríggjadagin kl. 15, og 51 básar verða við á framsýningini.

Bygdarstevna í Sumba

Vikuskifti 21.-23. juli, skipar Sumbiar Ítróttarfelag fyri árligu bygdastevnuni.

Á stevnuni verða ymisk áhugaverd tiltøk. Seyðahundafelagið sum hevur havt nógv tiltøk norðanfjørðs, kemur á fyrsta sinni til Suðuroyar, at vísa sera vælvandar seyðahundar reka, haraafturat verður ein sera áhugaverd framsýning í Skúlanum har millum annað Heri Andreasen, sum skipaði fyri kavingini niður á Jólaskipið greiðir frá, og sýnir upptøkur av kavingini, og lutirnar sum blivu tiknir upp av Jólaskipinum. Meira um skránna verður í bløðunum seinni í vikuni, sigur Sumbiar Ítróttarfelag

Bjóðar Grønlandi hægri blokkstuðul

Formaðurin í donsku fíggjarnevndini, Peter Duetoft, mælir til, at danir hækka blokkstuðlin til Grønlands afturfyri, at grønlendingar velja víðkað sjálvstýri fram um fullveldi

Formaðurin í fólkatingsins fíggjarnevnd, Peter Duetoft úr CD, heldur, at Danmark eigur at løna Grønlandi við hægri blokkstuðuli afturfyri, at Grønland ikki krevur fullveldi
Mynd: Føroyska Tíðindastovan

JOHN JOHANNESSEN

Afturfyri, at grønlendingar velja økt sjálvstýri fram um fullveldi, eigur danska stjórnin at løna grønlendingum við at hækka blokkstuðulin til Grønlands.

Hetta sigur formaðurin í fólkatingsins fíggjarnevnd, Peter Duetoft úr Centrum Demokratiska flokkinum, við Berligske Tidende.

Men skal blokkstuðulin økjast, mugu grønlendingar góðtaka, at danska stjórnin oyramerkir blokkstuðulin og krevur, at almenna grønlendska umsitingin verður skerd.

Krevur trygd

– Mótvegis Føroym, hevur Grønland borið seg væl at og ikki rópt upp um at gerast sjálvstøðugt ríki. Grønland hevur hildið fast við, at tað verður í ríkisfelagsskapinum, og tað skal ikki vera teimum ein vansi. Tí skulu grønlendingar hava størri frælsi, eins og vit noyðast at hyggja uppá búskaparligu trupulleikar teirra, sigur Peter Duetoft.

Danski fíggjarnevndarformaðurin heldur, at serliga grønlendska undirstøðukervið, sum til dømis elveitingin, er so vánaligt, at neyðugt er at hækka blokkstuðulin fyri at fáa hetta í rættlag.

Men skal blokkstuðulin til Grønlands hækka, krevur Peter Duetoft trygd fyri, at danski peningurin ikki hvørvur í stóru, almennu grønlendsku umsitingini.

– Skal Grønland hava øktan blokkstuðul, skulu vit hava trygd fyri, at umsitingin verður betrað og heldur uppat at hava eina stóra ovurnýtslu, sigur Peter Duetoft.

Krøvini frá danska fólkatingsliminum stríða tó beinleiðis ímóti 21 ára drúgvum mannagongdum, har grønlendska heimastýrið sjálvt hevur umsitið blokkstuðulin. Tí fær uppskotið hjá Duetoft harða mótstøðu frá grønlendskum politikarum.

Stórt afturstig

Hans Pavia Rosing, sum umboðar grønlendska stjórnarflokkin, Siumut, á fólkatingi, sigur við Berlingske Tidende, at hann er samdur við Peter Duetoft í, at grønlendska umsitingin skal skerjast, millum annað við at privatisera almenn virki.

Men Hans Pavia Rosing er hart ímóti, at danir skulu gera av, hvat peningurin skal nýtast til.

– Tað fer at vera eitt stórt afturstig fyri heimastýrið, um staturin skal leggja til rættis grønlendsk viðurskifti. Eg vil helst ikki, at Danmark skal blanda seg í okkara umsiting, sigur Hans Pavia Rosing.

Ellen Kristensen, ið umboðar grønlendska andstøðuflokkin, Atassut, á fólkatingi er tó ikki samd við Hans Pavia Rosing.

Ellen Kristensen heldur, at brúk er fyri meira peningi, serliga á almanna- og heilsuøkinum. Men samstundis heldur hon tað vera neyðugt at oyramerkja peningin.

– Vit mugu nú prógva, at vit kunnu gera nakað fyri peningin, vit fáa. Higartil er umsitingin bara vaksin og vaskin, meðan fólkið hevur fingið alt ov lítið burturúr, sigur hon.

Partur av grønlendska uppleggingum

At hækka blokkstuðulin til Grønlands er partur av uppleggingum um víðkað sjálvstýri, grønlendska sjálvstýrisnevndin í løtuni arbeiðir við.

Grønlendingar ætla sær at víðka heimastýrislógina frá 1978, soleiðis, at Grønland fær meira at siga á uttanríkispolitikkinum, eins og í hernaðarmálum.

Øðrvísi hús oman fyri Kvívík

Túgvurnar í Ognarhaga oman fyri Kvívík eru nú liðugt innrættaðar og klárar at taka í nýtslu.

Smáttturnar eru 27 fermetrar til støddar og verða leigaðar út til ferðafólk og onnur, ið hava hug til eitt friðarligt vikuskifti ella kanska eina heila viku í vøkru náttúruni millum Kvívík og Vestmanna.

Hvør smátta hevur pláss fyri fýra vaksnum og einum barni og er útgjørd ivð øllum hentleikum.

Fittligur brenniovnurin hitar væl, og har er eisini el-radiatorur, sum ein møguleiki,

Baðirúm við brúsu, vaskimaskina, strúkijarn og bretti, el-ovnur við tveimum kókiplátum, kuldaskáp við frystara, kaffimaskina o. a. køksútbúnaður.

Eisini eru sjónvarp, radio og telefon við íbinding til internetið.

Dýnur og koddar eru til taks, so fólki nýtist bert at hava seingjarklæði við.

Watson væl nøgdur við túrin

Sambært Paul Watson eydnaðist fyrsta stigið av Grindstop 2000 ætlanini í Føroyum frálíka væl

JOHN JOHANNESSEN

– Fyrsta stigið av Grind Stop 2000 eydnaðist avbera væl. Vit sigldu inn í Føroyskt sjóøki og gjørdu greitt, hvat vit vildu. Vit fingu góða umrøðu frá føroysku, donsku og hálendsku miðlunum.

Hetta sigur Paul Watson millum annað í tíðindaskrivi á heimasíðuni hjá Sea Shepherd, har hann tekur samanum vitjanina í Føroyum.

Paul Watson sigur eisini, at tað eydnaðist væl at fáa sjónarmiðið fram, um kyksilvurvandan hjá børnum, ið eta tvøst.

– Meðan vit vóru í Føroyum almannakunngjørdu føroysku myndugleikarnir eina almenna ávaring um vandan við kyksilvuri í tvøsti, sigur Paul Watson. Í hesum sambandi sipar hann til kyksilvurkanningina hjá Pál Veihe.

Watson vísir eisini á, at tað eydnaðist at gera føroyingar varugar við, at eitt virkið handilsbann móti føroyskum vørum er á veg.

Oman á alt sigur skiparin á Ocean Warrior, at skipið ótarnað sigldi inn og út úr føroyskum sjóøki, hóast føroysku myndugleikarnir royndu at forða teimum. Í hesum sambandi vísir Watson eisini á, at hann eisini fekk gleðina av at jagstra eitt danskt herskip gjøgnum føroyskan sjógv.

– Sum ein herferð fyri at fáa fólk at rakna við, eydnaðist hendan ferðin væl, sigur Watson. Hann vísir tó á, at eingir hvalir vórðu sæddir ella dripnir, meðan hann var í Føroyum. Tí fekk felagsskapurin ikki møguleika fyri beinleiðis at forða fyri nøkrum grindadrápi.

Paul Watson sigur, at hann royndi útgerðina, hann hevur at lurta eftir hvalum við, meðan hann var í Føroyum. Hendan útgerðin virkaði sambært Paul Watson væl, hóast hann ongan hval hoyrdi, meðan hann var her.

Í hesum sambandi sigur Watson seg stúra eitt sindur, tí hóast føroyingar siga, at tað eru 700.000 hvalir til, siga teir seg ikki hava sæð nakran hval síðani september, hóast tað er ógvuliga vanligt at síggja hval í juni og juli.

Paul Watson sigur at enda í tíðindaskrivinum, at manning hansara gleðir seg til at koma aftur til Føroya, og at fleiri av manningini hava sagt sær, at tey eru fús at vága bæði lív og frælsi fyri at steðga grindadrápinum.

Eingin nýggjur landsstýrismaður

JOHN JOHANNESSEN

Enn hevur løgmaður ikki gjørt av, um hann fer at seta Tórbjørn Jacobsen í starvið sum landsstýrismaður í undirvísingar- og mentamálum, hóast fíggjarnevndin í farnu viku vísti aftur fíggjarnevndarskjalinum frá løgmani, um at játta pening til landsstýrismannløn hansara fram til fyrsta oktober.

Løgmaður kom seint týsnáttina við flogfari heim úr Grønlandi, og var hann tískil ikki til arbeiðis í Tinganesi týsdagin.

Orsøkin til, at neyðugt er við eykajáttan til lønina hjá Tórbirni Jacobsen er, at fyrrverandi landsstýrismaðurin, Signar á Brúnni, hevur rætt til og fær løn fram til fyrsta oktober.

Av tí, at lógarbundnar útreiðslur sambært nýggju stýrisskipanini krevja játtan frá tinginum, ber ikki til hjá løgmanni at seta nýggja landsstýrismann, fyrr enn løgtigið hevur játtað peningin.

Løgmaður segði kortini í farnu viku, at hann ætlaði sær at kanna, um nakar møguleiki var at seta landsstýrismannin kortini, og síðani skuldi hann taka støðu til málið týsdagin. Men enn hevur løgmaður ikki havt stundir at taka hesa avgerð.

Súkklukapping

Statoil - kring Føroyar

Bláa fararatroyggjan

Vinnarin av Statoil kring Føroyar 2000 verður heiðraður á Statoil-støðini í Gundadali, har býráðsformaðurin handar heiðursmerki.

Flúgvitalerkar til børnini

Okkurt verður til áskoðarar, m.a. fáa børnini ókeypis Statoil-flúgvitalerkar.

Á øllum etapunum bjóðar Statoil sandwich, kaffi, te o.a. til luttakararnar.

Fylgið við súkklukappingini á www.tsf.fo

Tíðarætlan

Mikudagur 19. juli - Prologue
Klaksvík (uml. 2,7 km.)
Start/Mál við Statoil-støðina
Byrjar kl. 18.15 - endar uml. kl. 19.00

Hósdagur 20. juli - 1. Etapa
Norðskáli - Leirvík - Saltangará (uml. 106 km.)
Mál við Statoil-støðina í Saltangará
Byrjar kl. 13.30 - endar uml. kl. 16.15

Fríggjadagur 21. juli - 2. Etapa
Sandur
(Einkultstartur) runt Sandsvatn uml. 25 km.)
Mál við Statoil-støðina
Byrjar kl. 15.30 - endar uml. kl. 16.45

Leygardagur 22. juli - 3. Etapa
Drelnes - Sumba - Vágur (uml. 56 km.)
Mál við Statoil-støðina í Vági
Byrjar kl. 13.00 - endar uml. kl. 14.30

Sunnudagur 23. juli - 4. Etapa
Tjørnuvík - Vestmanna - Tórshavn (uml. 110 km.)
Mál við Statoil-støðina í Gundadali
Byrjar kl. 14.00 - endar uml. kl. 17.00

Eftir hvørja etapu fáa nr. 1, 2 og 3 blómur, og fararin letur seg í ta bláu fararatroyggjuna.

STATOIL
- kring Føroyar

petur & petur • 320870